# Seinastu sjúkrasystrarnar av sínum slag útlærdar

**Mikudagin 25. mai vóru 18 sjúkrafrøðilesandi til endaliga prótøku. Hetta var ein serlig løta fyri føroyska sjúkrarøkt, tí hetta var seinasti sjúkrarøktarfrøðiflokkurin av sínum slagi**

PRÓVTØKA
*Eydna@sosialurin.fo*

Seinastu sjúkrasystrarnar, ið hava gingið eftir gomlu útbúgvingini, vóru mikudagin til endaliga próvtøku.

Sjúkrarøktafrøðingaútbúgvingin er nú umløgd, soleiðis, at næstu sjúkrarøktarfrøðingarnir, sum verða útlærdir í Føroyum, fáa heitið »bachelor«. Útbúgvingin verður í tí sambandi eisini longd nakað. Hon fer framyvir at taka 4 ár í staðin fyri 3 ár og 9 mánaðir, sum higartil.

Johild Dulavík, ið undirvísir á sjúkrasystraskúlanum, sigur, at hesin seinasti flokkurin eisini var framúr góður.

Tær syrgdu nevniliga fyri at siga eitt ordans farvæl við gomlu útbúgvingina og skúlan.

– Vit hava fyrr havt flokkar, sum hava staðið seg væl, men hesin flokkurin skarar framúr. Tær fingu 10,0 í miðal, og tvey 13-tøl vóru givin, greiðir Johild frá.

Hon leggur afturat, at tað ikki er vanligt.

– Tær arbeiddu nógv í bólkum, og fóru síðani upp til próvtøkuna ein og ein. Og tær fingu heilt ótrúliga flott próvtøl, staðfestir Johild Dulavík.

Komandi ár verða ongir sjúkrarøktarfrøðingar útlærdir, orsakað av umleggingunum í útbúgvingini. Tær næstu verða ikki lidnar fyrr enn í januar 2007.

Fríggjadagin 27. mai kl 14 fingu nýklaktu sjúkrarøktarfrøðingarnir prógv handað.

Sosialurin ynskir sjúkrarøktarfrøðingunum hjartaliga tillukku við útbúgvingini og flottu próvtølunum.



*Sjúkrarøktarfrøðingarnir, sum fingu prógv handað fríggjadagin tann 27. mai 2005. Standandi aftast frá vinstru : Elisabeth B.Larsen, Guri Mørkøre, Majken Ludvig, Inga C.C. Old, Bjarta Arge Olsen, Lina Næs, Tina Petersen, Lillian B. Poulsen, Nathalia Rognsøy, Jóhanna F. Zachariassen. Fremst frá vinstru: Sigbjørg Andreassen, Eydna S. á Geilini, Katrin Hansen, Sunrid Isaksen, Tina Johannesen, Margit Justinussen, Elin Kirke. Gunnvá Heinesen, sum eisini fekk prógv, vantar á myndini*




## Óvanliga friðaligt vikuskifti

Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn, sigur, at vikuskiftið hevur verið framúr friðaligt.

– Fríggjakvøldið og leygarkvøldið vóru nøkur heilt fá smáting. Onkur var avdottin, sum vit hjálptu aftur á beinini, og okkurt par var farið at skeldast, sum vit tosaðu tilrættis. Men einki av serligum týdningi er hent um vikuskiftið, staðfestir vakthavandi.

Hann sigur víðari, at sunnukvøldið og mánanáttina er ikki ein einasti bókstavur skrivaður í døgnrapportina, so tá er als einki hent.

Tíbetur, kunnu vit kanska skoyta uppí.

eys